# Enn meira sannførdur

JÓGVAN Á LAKJUNI
løgtingsmaður



**Eg eri í hvussu er vorðin enn meira sannførdur um – og serliga aftan á hesa greinina hjá Jón Brian – at vit mugu hava tvær tíðindadeildir og tveir tíðindaleiðarar í Kringvarpinum**

Jón Brian Hvidtfeldt hevur eina sera ógvisliga grein í bløðunum í kvøld, har hann leggur eftir okkum politikarum. Eg skal ikki gera nógvar viðmerkingar til ósakligheitirnar, men skal bara royna at greiða frá, hví politikarar eru argir inn á Kringvarpið.

Heilt frá byrjan, tá ið ætlanin um at leggja útvarp og sjónvarp saman bleiv kunngjørd, varð dentur lagdur á, at vit framvegis skuldu hava tvær tíðindadeildir. Í tíðindaskrivinum, sum varð sent út í hesum sambandi, varð m.a. sagt um hetta: "Sostatt fáa vit ein sterkan almennan public service stovn, ið tó av givnum grundum *eigur at hava tvey sjálvstøðug og óheft redaktiónsumhvørvi*."

Hetta varð eftir eina fjølmiðlasemju millum allar teir stóru flokkarnar á tingi eisini staðfest í lógaruppskotinum, sum bleiv lagt fyri tingið 7. apríl 2006. Grein 6, stk. 2 varð soleiðis orðað: "Stjórin ger uppskot til stovnsbygnað, sum stýrið staðfestir, *tó so at tað til eina og hvørja tíð skulu vera tvær tíðindaeindir*", og í viðmerkingunum verður sagt, at orsøkin til ásetingina um tvær tíðindaeindir er kappingarfyrilit.

Mentanarnevndin, ið fekk uppskotið til viðgerðar, tók fult undir við hesum, men var ikki fullnøgd við orðingina og skeyt upp at seta orðið "sjálvstøðugar" inn aftrat, soleiðis at orðingin í grein 6, stk. 2 bleiv herd og kom at ljóða soleiðis: " . . . *skulu vera tvær sjálvstøðugar tíðindaeindir*". Í sínum viðmerkingum sigur Mentanarnevndin um hetta: "Nevndin hevur lagt stóran dent á, at tað verða tvær sjálvstøðugar tíðindaeindir í Kringvarpi Føroya. Fyri at staðfesta, at tíðindaeindirnar vanliga skulu arbeiða hvør sær, og fyri at tryggja fjølbroytni í tíðindaflutninginum soleiðis, at føroysku samfelagsviðurskiftini verða viðgjørd frá so nógvum sjónarhornum sum møguligt, skjýtur nevndin upp at broyta grein 6, stk. 2 soleiðis, at orðini sjálvstøðugar tíðindaeindir verða sett inn".

Hetta er so greið tala, at tað er óskiljandi, at nakar skal hava funnið upp á hetta við einum tíðindaleiðara. Løgtingið hevur greitt og týðiliga talað og sagt, hvussu hetta skal vera. Her átti als eingin ivi at verið!

Jón Brian nevnir í greinini, at Mentanarnevnd Løgtingsins, sum eg sjálvur var partur av, bleiv boðin á fund í Kringvarpinum í mai í fjør, har kunnað varð um ymisk viðurskifti, og m.a. varð greitt frá ætlanini um nýggjan bygnað við einum tíðindaleiðara.

At hesin fundur nú verður nýttur sum alibi fyri at seta bygnaðin í verk, er so langt úti, at tað er ikki orð fyri tí. – Ja, tað er beinleiðis manipulatión.

Men Útvarpið (tað fjórða statsvaldið, sum Jón Brian sigur) smæðist ikki við í tíðindunum á middegi 25. feb. at fara so langt sum at siga: "Áðrenn Kringvarpið søkti eftir nýggjum deildarleiðarum, hevði tað fingið vissu frá bæði táverandi landsstýriskvinnu, Kristinu Háfoss, og Mentanarnevndini í løgtinginum, at ein tíðindaleiðari ikki var í stríð við lógina". Hetta er beinleiðis ósatt!

Eg veit væl, at Kristina Háfoss gav loyvi til hetta, men Mentanarnevndin gav als ikki nakra vissu um hetta! Tvørturímóti!

Tíbetur er ein fundarfrásøgn frá fundinum, og m.a. stendur soleiðis skrivað: "Stjórin spurdi, um hon hevði heimild at broyta tíðindaeindirnar sambært lógini. Heidi Petersen og Jógvan á Lakjuni vóru á einum máli um, at tað kundu tey ikki lova! Tey løgdu dent á, at hetta var ein kunnandi fundur, og tað var Kringvarpsstýrið, ið tulkaði lógina."

Eg má siga, at eg kenni meg bóndafangaðan. Og tá ið tú upplivir tað – og so ikki um at tala ta stóru vanvirðing, sum Kringvarpið hevur víst Føroya fólki í sambandi við Morgunlesturin – ja, so er ikki undarligt, at tú verður argur.

Eg eri í hvussu er vorðin enn meira sannførdur um – og serliga aftan á hesa greinina hjá Jón Brian – at vit mugu hava tvær tíðindadeildir og tveir tíðindaleiðarar í Kringvarpinum.

# Fyrsti føroyski hjálparpakkin!

MAGNI LAKSÁFOSS
Streymnes



**Loksins eydnaðist at fáa undirtøku fyri einum tiltaki, sum veruliga gagnar pensiónistum, skapar virksemi í byggivinnuni og eisini er við til at minka um oljunýtsluna. Talan er um at fáa gongd aftur í virksemið hjá Bjálvingarstuðulslánsgrunninum**

**Gott hjá pensiónistunum**

Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin er ein grunnur, sum ger tað møguligt hjá pensiónistum og fyritíðarpensiónistum at fáa lán til at bjálva húsini betur og harvið minka um oljunýtsluna til upphiting.

Hetta er ein stórur lætti fyri hesar samfelagsbólkar, sum ikki hava ov nógv av peningi og har oljurokningin kann kennast serliga tyngjandi. Hugsanin er nú at tilboðið eisini skal fevna um aðrar samfelagsbólkar – hetta er at fegnast yvir.

Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin er ikki nakar nýggjur grunnur, men trupulleikin hevur verið, at eingin peningur hevur verið í grunninum. Nú verður peningur fluttur inn í grunnin, soleiðis at hann aftur gerst virkin.

**Minka um oljunýtsluna**

Oljunýtslan í Føroyum er ein stórur og tyngjandi postur, bæði hjá húsarhaldunum og á gjaldsjavnanum. Tí hevur tað stóran týdning at fremja átøk, sum minka um oljunýtsluna. At vit samstundis eisini minka um útlátið av vakstrarhúsgassum ger tað heila bara enn betur.

Av tí at sethús er stórur partur av samlaðu húsamongdini, vil ein minking í oljunýtsluni har hava stóran týdning fyri at røkka málinum. Pensiónistar sita ofta í elstu og minst bjálvaðu sethúsunum og hevur tað eyka stóran týdning at fáa júst hesi húsini bjálvaði betur.

**Skapa virksemi í byggivinnuni**

Ein onnur orsøk til tiltakið er, at stimbra um virksemið nú tekin eru um at búskapurin og serliga byggivinnan er fyri bakkasti. Bjálving og umvæling av húsum er serliga arbeiðskrevjandi og vil hetta vera við til at stimbra munandi um virksemið í byggivinnuni. Umvæling av húsum verður ofta sagt at hava ein lønarpart á millum 65 og 70 prosent. Til samanberingar hevur ein íløga í ein tunnil einans ein lønarpart á umleið 20 prosent. Umvæling av húsum vil hava nógv størri ávirkan á byggivinnuna og vil harumframt geva munandi fleiri inntøkur í landskassa og kommunukassarnar, enn um peningurin bleiv brúktur til berghol og vegir.

Til stuttleikar kann eisini nevnast, at meðan bankabjargingarnar vóru uppskot úr danska fólkatinginum, er hetta uppskotið eitt reint føroyskt uppskot. Tí má hetta uppskotið metast at vera fyrsta føroyska íkastið til ein hjálparpakka til búskapin.

**Langt og hart stríð**

Langt og hart stríð hevur verið fyri at fáa framt tiltakið. Arbeitt hevur verið fyri at skapa undirtøku fyri uppskotinum, og hevur hetta eydnast bæði í samgonguni og anstøðuni.

Hóast undirtøkan hevur verið fyri uppskotinum, hevur gingið sera striltið at fáa landsstýrið at koma við neyðugu lógarbroytingunum. Tá evstamarkið at leggja lógaruppskot fyri tingið er í dag, fríggjadagin 27. februar, avgjørdi eg fyrr í vikuni sjálvur at taka stig til at leggja uppskotið fyri tingið, saman við øðrum uppskotsstillarum. Tá vísta tað seg at ganga skjótari hjá landsstýrinum at koma við neyðugu lógarbroytingunum. Tí bleiv avgerð tikin um ikki at leggja uppskotið fyri tingið, men heldur at taka undir við uppskotinum hjá landsstýrinum.

Eg vil tí hervið takka landsstýrismanninum í fíggjarmálum fyri at hann loksins kom við lógaruppskotinum.

# Sjúrður Skaale er farin í baklás

JASPUR VANG
Løgtingsmaður og formaður í Landsstýrismálanevndini



Uttan mun til, hvussu Sjúrður Skaale snarar málinum, so var sonevnda "lásagølan" ein politisk ósemja og eitt pínligt og skammiligt valdsstríð millum tveir floksformenn, sum ikki kendu sær hógv.

Eftir at tíðindablaðið Sosialurin farnu vikuna hevur umrøtt sonevndu "lásagøluna", har stríðið millum Jóannes Eidesgaard, formann fyri Javnaðarflokkin, og Høgna Hoydal, formann fyri Tjóðveldi, m. a. hevði við sær, at CHE-samgongan endaliga fór í uppløysn, leggur Sjúrður Skaale í blaðgrein við órøttum Føroya Løgting undir valdsmisnýtslu og ein meiriluta í Løgtingsins Landsstýrismálanevnd, og harvið undirritaða, undir at fjala sannleikan í trætumálinum um hølini í Tinganesi.

Samstundis samantvinnar Sjúrður Skaale snildisliga, men á villeiðandi hátt politik, moral og løgfrøði, uttan at gera vart við markamótið millum politik og løgfrøði. Tí hesa viðmerking.

**Fullur opinleiki**

Sum Sjúrður Skaale vísir á, hevur Løgtingsins Landsstýrismálanevnd viðgjørt trætumálið um hølisviðurskiftini í Tinganesi út í æsir, og í tí sambandi sjálvsagt fingið útflýggjað neyðug skjøl og upplýsingar í málinum, umframt frágreiðingar frá høvuðspersónunum báðum, Høgna Hoydal og Jóannes Eidesgaard.

Ein meiriluti í Landsstýrismálanevndini, sum ansar eftir, at landsstýrismenn og løgmaður útinna sítt starv á lógligan hátt, kom til tað niðurstøðu, at illgruni ikki var um, at lógarbrot, sum verður átalað av tí almenna, var framt, og at grundarlag sostatt ikki var fyri at nýta kanska úti við 1 mió. skattakrónur og seta ein kanningarstjóra at kanna málið.

Tað stendur einum og hvørjum frítt fyri at gera seg kunnugan við nevndu skjøl, frágreiðingar og niðurstøðu á heimasíðu Føroya Løgtings, og á tann hátt gera sær sínar egnu metingar av málinum. So har er einki at fjala.

At Sjúrður Skaale hevur eina aðra áskoðan enn meirilutin í Landsstýrismálanevndini og løgfrøðiliga ráðgevingin hjá Føroya Løgtingi, eins og løgfrøðingar eru ymiskir á máli, er einki løgið í.

Tað kann tó tykjast undrunarvert, at Jóannes Eidesgaard ella Høgni Hoydal, um so er, at annar ella báðir teirra kenna seg at hava verið fyri so álvarsligum lógarbroti, sum Sjúrður vil vera við, ikki fráboðaðu løgregluni lógarbrotið beinan vegin hendingarnar fóru fram.

Sjúrður fer í baklás og vísir reyv.

Umframt at Landsstýrismálanevndin kann seta kanningarstjóra, kann Føroya Løgting seta kanningarstjóra. Hettar tó treyta av, at 2/5 av løgtingslimunum taka undir við tí. Tað er tó umráðandi at gera sær púra greitt, at treytirnar fyri at seta kanningarstjóra sambart Stýrisskipanarlógini eru, at talan er um illgruna um lógarbrot. Eftir at niðurstøðan hjá Landsstýrismálanevndini fyrilá, fór Sjálvstýrisflokkurin undir at savna inn undirskriftir við tí endamáli at fáa Løgtingið at seta kanningarstjóra.

Eftir øllum at døma er tað ikki eydnast Sjálvsstýrisflokkinum og Sjúrða Skaale at sannføra 2/5 av tinglimunum um, at illgruni er um lógarbrot, og at avgerðin hjá Landsstýrismálanevndini var skeiv.

Heldur enn at virða fólkaræðið og ásanna, at avgerðin hjá Landsstýrismálanevndini var røtt, eins og ein stórur meiriluti av tinglimunum eftir øllum at døma ger, fer Sjúrður Skaale í baklás, vendir tingunum á høvdið og leggur Landstýrismálanevndina undir at fjala sannleikan í málinum, eins og Sjúrður vanvirðir Føroya Løgting við skuldseting um, at avgerðin hjá løgtingsmonnum um ikki at taka undir við at seta kanningarstjóra, "luktar av valdsmisnýtslu".

Fyri at nýta málburðin hjá Sjúrða Skaale sjálvum, so vendir Sjúrður Skaale føroyska fólkaræðinum og einum stórum meiriluta av føroysku veljarunum reyv, tá fólkaræðiligu avgerðirnir ikki eru honum til vildar.

Føroya fólk er dómari í málinum um lásagøluna.

Sjúrður Skaale skal hava púra rætt í tí, at lásagølan gjørdi Føroyum fyri skommum í grannalondunum, eins og lásagølan skaddi umdømið hjá – og virðingina fyri føroysku politisku skipanini millum føroyingar. Í einum fólkaræði sum okkara er tað soleiðis, at politikarar og løgtingslimir standa til svars fyri sínum politisku gerðum yvir fyri veljarunum. Í hesum máli verður tað tí tann føroyski veljarin, sum kemur at gera av, hvør – ella hvørjir tað vóru, sum gjørdu føroyingum fyri skommum í lásamálinum.